## Khatami lagdur undir landasvik

Fyrrvendi iranski forsetin, Mohammad Khatami, fekk av álvara øði í landsins átrúnaðarligu leiðarar, tá hann gjáramorgunin fýlt-ist á, at myndugleikarnir hava drigið meiri enn 100 fólk í rættin, tí tey vóru uppi í mótmælunum í síðsta mánað. Orðini hjá Khata-mi fullu í so ringa jørð, at teir mest víðgongdu leiðararnir hava hug at skuldseta fyrrverandi forsetan fyri landasvik. Hildið verð-ur, at umleið 2.500 fólk vórðu tikin, tá tey mótmæltu úrslitinum av forsetavalinum, og at umleið 250 teirra sita í fongsli enn.



## Heldur Guð enn læknan

Nakrir trúarbólkar í USA velja at leggja øll lívsins viður-skifti í Guðs hendur, og limirnir fara ongantíð til læknan, sama hvat bagir teimum. Tað skriva amerikanskir fjølmiðl-ar. Teir siga millum annað frá hjúnunum Dale og Leilani Neumann. Tey áttu eina dóttur, men vildu ikki fara til lækn-an við henni, tá hon gjørdist illa sjúk. Gentan versnaði skjótt, og sjálvt um hon at enda misti vitið, vildu foreldrini ikki ringja til læknan, men valdu heldur at biðja til Guð. Men endin varð, at gentan doyði, og nú kunndu hjúnini vænta sær upp í 25 ára fongsul fyri vanrøkt, skrivar AP.

# Knústi glas í andlitið

**Ein 22 ára gamal russari varð í Føroya rætti sunnukvøldið varðhaldsfongslaður fram til 17. august. Hann er skuldsettur fyri serliga grovan harðskap**

HARÐSKAPUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



*Tað var her í gongugøtuni í Havn, at russarin slerdi hin mannin í andlitið við einum ølglasi*

Stutt fyri klokkan fýra sunnumorgunin kom eitt ungt par gangandi eftir gongugøtuni í Havn, og har møttu tey bæði fólkini tveimum russarum, sum vóru fullir.

Annar russarin hevi eitt glas í hondini, og hann tók og slerdi tann føroyska mannin í andlitið við glasinum, ið brotnaði.

Soleiðis hevur tann álopni maðurin greitt frá.

Sunnukvøldið var russarin í grundlógarhoyri, men hann mintist lítið frá hendingini. Hann var komin til Føroya 10 dagar frammanundan við flogfari til eitt skip, sum liggur til umvælingar á skipasmiðjuni í Havn.

### Mintist einki

Hetta kvøldið høvdu hann og ein vinmaður sitið umborð og drukkið, áðrenn teir fóru í býin. Russarin mintist bara, at teir høvdu veið inni í einum skeinki-staði, og hann fór út við einum glasi í hondini. Hann mintist, at hann hevði møtt ti unga parinum, men síðan mintist hann ikki meira.

Politiið hevur avhoyrt vinmannin, og hann mintist líka lítið, tí teir høvdu báðir verið líka fullir.

Beint eftir hendingina tók politiiðå tann 22 ára gamla russaran, sum varð settur í klivan. Hann bløddi tá í hondini.

### Slapp væl

Tann álopni maðurin fekk skeinur í kjálkan, tinningin og við oyrað, men skurðirnir vóru ikki so djúpir, at neyðugt var at seyma.

Russarin er skuldsettur fyri at hava framt serliga grovan, ógvusligan ella vandamiklan harðskap.

Eftir útlendingalógini er kravið hjá ákæruvaldinum, at maðurin verður vístur av landinum.

Sunnukvøldið varð bara tann skuldsetti maðurin avhoyrdur. Av tí at rætturin skal hoyra vitnini, unga parið og hin russaran, varð russarin varðhaldsfongsl-aður fram til 17. august.

## Bót fyri at skjóta svartfugl

**Ein tilkomin vágamaður varð fríggjadagin tikin fyri at skjóta svartfugl. Skotnu fuglarnarir og byrsan vórðu tiknir frá manninum, sum haraftrat fær bót**

LÓGARBROT
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Frá 1. oktober til 20. januar er als ikki loyvt at skjóta svartfugl, tí meldaði onkur fríggja-dagin seinnapartin ein mann, sum vr farin út á Sørvágsfjørð at skjóta fugl.

Tá ið maðurin kom aftur at landi, stóð politiið fyri honum. Politiið legði hald á teir 22 fuglarnar, sum maðurin hevði skotið, og byrsuna noyddist hann eisini av við. Fuglarnir vóru lundar, lomvigar og álkur.

Maðurin varð skuld-settur fyri brot á løg-tingslógina um fugla-veiði, ið m.a. sigur, at ikki er loyvt at skjóta svartfugl hesa ársins tíð.

Tann tilkomni mað-urin kann vænta sær bót fyri lógarbrotið.

# Omanlop á Eldurvíkarvegnum

**Nakrar tímar leygar-náttina var ikki koyr-andi eftir Elduvíkar-vegnum, ti grót var rapað oman á vegin**

OMANLOP
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Klokkan 00.20 leygarnátt-ina fekk politiið fráboðan um, at grót varð lopið niður á Elduvíkarvegin. Har lógu so stórir steinar, at ikki var koyrandi.

Eingin var har beint tá, og tí hendi eingin skaði.

Boðini fóru víðari til Landsverk, sum beinanveg-in fór at rudda. Klokkan fyra var koyrandi aftur. Steinarnir vóru tá skump-andi út av koyribreytini.

Tað var lopið úr berginum, og júst har vita tey ikki um onnur omanlop. Eitt petti frá, nærri Funningsfirði, leyp eina ferð í fjør.



*Landsverk skumpaði steinarnar utút av vegnum*